# A A heiðrað fyri á á

**Atlantic Airways varð á árliga vinnudegnum í Norðurlandahúsinum í seinastu viku heiðrað við viðurkenningini ársins átak**

ÁTAK
*Edvard Joensen*



*Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, tók í móti heiðrinum fyri ársins átak*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey, sum standa fyri árliga vinnudegnum hildu, at Atlansflog átti at verða heiðrað fyri sáttmálan, sum felagið hevur gjørt við norsku fyritøkuna Aker Stord. Tí fekk Atlantsflog heiðurin fyri ársins átak.

Tað er Vinnuhúsið, sum stendur fyri árligu vinnudøgunum, sum hildnir verða í Norðurlandahúsinum. Har verður millum annaða eisini ársins virki útnevnt. Í ár var tað bilasølan Reyni Service, sum fekk hendan heiðurin.

Fyri ársins átak fær Atlantsflog heiðursbræv og eina standmynd umframt blómur og tann heiður, sum fylgir við eini slíkari viðurkenning, sigur Malan Johansen, sum arbeiðir í Vinnuhúsinum. Tað fylgja eingir pengar við eini slíkari útnevning.

Tað var eisini onkur annar, sum varð heiðraður hendan dagin. Eitt nú klædnafyritøkan Guðrun og Guðrun, um hava fingið sølusáttmála við stóran svenskan keypara.

Í grundgevingini fyri heiðurinum fyri ársins átak sigur Vinnuhúsið soleiðis:

»Føroyska samfelagiðog føroyskt vinnulív er í stórari broyting viðnógvum avbjóðingum. Vinnur og fyritøkur, sum fyri fáum árum síðani, høvdu glæsiligar tíðir, eru fyri stórum hóttafalli og avbjóðingum. Men júst slíkar tíðir eggja til nýggjar loysnir, nýggjar leiðir og kreativitet.

Sjálvt um tað fyri trimum árum síðani varðhildið, at tað var óvist, um tað á hvørjum ári fór at vera gjørligt at taka fram og heiðra eitt ársins átak, hevur hetta ikki veriðnakar trupulleiki. Heldur ikki í ár hevur verið trupult at sígga serlig átøk, ið kunnu gagna vinnuligum framburði sum heild í landinum. Her er úr at velja, bæði millum einstaklingar og fyritøkur.

Føroysk kreativ vinna hevur til dømis gjørt vart við seg á altjóða palli. Her skarar Guðrun & Guðrun framúr viðsínum áhaldni, ið hevur givið afturljóð í Japan, men serliga við sáttmálanum við svensku stórfyritøkuna NK Her er dømi um, at tú verður sjáldan føddur víðagitin, men gerst hetta við vilja, áræði og arbeiði, umframt sjálvsagt at tú hevur okkurt forkunnugt at bjóða.

Størsta einstaka nýbrotið seinasta árið heldur nevndin kortini vera sáttmálan hjá Atlantic Airways við Aker Stord.

Atlantsflog var ein av fyritøkunum, sum brynjaði seg til møguliga føroyska kolvetnisvinnu. Tá "oljufepurin" kólnaði fyri tveimum árum síðan, misti Atlantsflog ikki áhugan fyri frálandavinnuni, men helt á fram at knýta sambond og bjóða seg fram í frálandavinnuni, og á annan hátt at menna vinnuliga inntøkugrundarlagið hjá felagnum. Flúgvingin til Italia er eitt dømi um hetta. Men tað sum nevndin metir sum serstakt átak, vert at heiðra, er sáttmálin sum felagið hevur fingið við Aker Stord um flúgving av starvsfólki millum Stord og Stavanger og Alta í Norður Noregi. Eitt er, at felagið sjálvt kann taka hesa flúgving á seg. Annað og eins týdningarmikið er tað, at felagið við hesum slóðar vegin fyri øðrum feløgum, sum hava valt at hava annað beiniðí frálandavinnuni. Við sínum gjøgnumbroti kann Atlantsflog vera við til at skapa álit uttanlands á føroyskum fyritøkum og lætta um hjá teimum at koma inn í hesa heldur afturlatnu vinnu.

# Børn í vanda

**Børn eru serliga útsett fyri at gerast misnýtarar av ymsum slagi. Blái Krossur er saman við nøkrum føroyskum kommunum farin undir fyribyrgingarátak, sum skal fáa børn at byrja seinni at roykja og drekka**

FYRIBYRGING
*Edvard Joensen*



*Jónhild Jørgensen, formaður í Felagskommkununi í Vágum v.m. og Tórhild Bjarkhamar frá Bláa Krossi. Felagskommunan er við sum royndarkommuna í átakinum »Børn í vanda«. Tórhild Bjarkhamar er ráðgevi hjá kommununi*
*Mynd: Edvard Joensen*

Tað er lættari at fyribyrgja enn at lekja, ásannar Blái Krossur, sum er farin undir eitt stórt fyribyrgingarátak, sum nevnt verður »Børn í vanda«.

Tórhild Bjarkhamar, sum vegna Bláa Kross stendur fyri átakinum, greiðir frá, at ætlanin vi hesum er at fáa ávirka børn og ung at byrja seinni at roykja og drekka, enn vit ofta síggja tað í dag.

»Hetta er ikki ein ætlan at fáa fólk at leggja av ella umvenda nakran. Hetta er ein roynd at fáa eitt opið orðaskifti um rúsevni sum heild. Millum børn og foreldur. Foreldur sínámillum. Foreldur og ymsar myndugleikar og millum fólk sum heild. Tí tað hevur leingi sæð út til, at hetta er eitt tabu evni, sum eingin vil ella torir at tosa um«, sigur hon.

Hon greiðir frá, at hetta átakið er ætlað at vara í trý ár, soleiðis at til ber at fylgja tí og gera metingar um, hvørt tað hevur nakra ávirkan ella ikki.

Blái Krossur hevur fyrr havt eitt tiltak, sum nevnt varð »Rusfrí avtala«. Tað tiltakið vendi sær til børn í 7. flokki.

Hetta nýggja tiltakið er ætlað øllum børnum og ungum frá føðing til 18 ára aldur. Og ikki minst teimum, sum eru um hesi børnini, greiðir Tórhild Bjarkhamar frá.

Hesi, sum eru um børnini, eru í hesum sambandinum umframt foreldrini eisini starvsfólk á dagstovnum og skúlum. Frítíðarleiðarar so sum ítróttar- og skóta- og samkomuleiðarar. Barnaverndarlimir og kommunalpolitikarar. Ætlanin er at fáa øll hesi í talu á skeiðum, sum hildin fara at verða um evnið. Og her er tað, at kommunurnar koma við í átakið.

Klaksvíkar Kommuna og Felagskommunan í Vágum hava játtað at vera royndarkommunur í hesum átakinum við at lata tey, sum starvast við børnum og ungum í økinum taka lut í skeiðum og á tann hátt at kunna tosa við hesi fólkini og virka við til, at rúsevnisnýtslan millum ungfólk kann tálmast og helst minka. Eisini Runavíkar Kommuna verður við í ávísan mun, sigur Tórhild Bjarkhamar.

Hon sigur, at tey hava við vilja ikki sligið tað ov stórt upp at byrja við. Men tey, sum Blái Krossur hevur havt samband við, hava verið sera positiv og tikið væl í móti hugskotinum. Eisini um kommunurnar skulu leggja nakað av peningi í átakið.

»Hetta er ikki eitt vinnuligt átak, sum gevur avkast aftur beinanveg«, ásannar Tórhild Bjarkhamar. Men tann vinningur, sum kann fáast burtur úr hesum við tíðini, er ikki so lítil, um bert nøkur fólk kunnu haldast frá rúsevnum í longri tíð.

Hon vísir til royndir sum vísa, at serliga børnini eru lætt offur fyri misnýtslu, og fyrr ein byrjar, størri eru møguleikarnir fyri at fara í hundarnar.

Men her sum við so mongum øðrum er ein góð fyrimynd gull verd. So um foreldrini ganga undan sum góð fyrimynd, hjálpir tað beinaveg upp á vanarnar hjá børnunum. At so tey, sum børnini annars eru saman við og síggja upp til, eisini hugsa soleiðis, er bara dupultur vinningur.



Harraboð til sjálvbodnu feløgini:

# Skerjið 10 prosent

**Nógv hevur verið at hoyrt um 10 prosentini í miðfyrisitingini, men heldur ikki smáu feløgini, sum til dømis Javni, Sinnisbati, Kvinnuhúsið, Mbf og Blákross, eru sloppin snikkaleys. Eisini tey skulu nú skerja 10 prosent av nýtsluni.**

SPARINGAR
*Eydna Skaale*
*Savnsmyndir*
*Eydna@sosialurin.fo*

Kvinnuhúsið:

## Reingerð og viðlíkahald rýkur



– Sjálvandi kemur tað at merkjast á okkara fíggjarætlan, at vit brádliga hava 50.000 kr minni at arbeiða við árliga, tí vit hava so lítið av pengum at arbeiða við frammanundan, sigur Elin Reinert Planck, leiðari á kvinnuhúsinum um skerjingina á 10%

– Av tí, at vit hava so lítla fíggjarorku frammanundan, er avmarkað hvar vit kunnu spara. Vit hava trý lønt arbeiði, eitt er 20 tímar um vikuna, eitt er 25 tímar um vikuna og so arbeiði eg sjálv fulla tíð. Her kunnu vit ikki spara meiri, og tí verður einki arbeiði niðurlagt, greiðir Elin Reinert Planck frá.

Hon sigur víðari, at húsaleigan er fastløgd, og at tað tískil ikki ber til at skerja av teimum pengunum.

– Tað einasta vit kunnu skerja, er reingerðin og innkeyp til dagliga raksturin, staðfestir hon.

Hon sigur, at hetta sjálvandi fer at merkjast aftur. – Men, sum hon sigur, – Okkara virksemi kann halda fram, sjálvt um veggirnir eru skitnir.

Hon sigur, at hetta eisini fer at merkja, at alt viðlíkahald av kvinnuhúsinum má koma í aðru røð.

–Vit hava eitt ávíst slit av húsinum. Tí eru útskiftingar altíð neyðugar. Hetta má nú skerjast, sigur Elin.

### Søkja aðrastaðis

Elin sigur, at leiðslan á Kvinnuhúsinum ætlar sær at fara at søkja um stuðul aðrastaðir frá.

– Vit hava altíð søkt um stuðul, tí vit hava altíð koyrt við ov lítlari játtan á fíggjarlógini. So fáa vit at síggja hvussu tað verður. Spurningurin er, um játtanin nakrantíð verður hækkað aftur, so hetta mugu vit kanska bara venja okkum við, sigur Elin.

Hon undrast tó eitt sindur á sparingarnar, sum nú eru gjørdar.

– Eg veit ikki heilt, hvat teir gera. Eg dugi ikki at síggja hví teir skulu spara á hendan hátt, við at skerja stuðulin til smáu feløgini. 50.000 kr her og 30.000 har, muna ógvuliga lítið í tí stóra og heila, men tað ger ógvuliga stóran mun hjá smáu feløgunum at missa hesar upphæddirnar. Eg haldi tað vera sera løgið, at man fer eftir hesum smáu upphæddunum, staðfestir Elin Reinert Planck at enda.

mbf:

## Verða ikki tikin í álvara



– Í fjør fingu vit endiliga eina játtan, sum hóskaði seg okkara tørv. Vit umboða jú 23 feløg. Men longu í ár skerja teir hana aftur. Hetta fer at hava stóra ávirkan, tí 140.000 kr er ein formua í okkara verð, sigur Leila Solmunde, formaður í mbf.

– Vit hava veruliga brúk fyri hvørjari krónu av játtanini, og nú verður hon skerd. Hetta kemur fyrst og fremst at ganga út yvir tey 23 feløgini, sum vit umboða, og sum gera eitt ógvuliga stórt arbeiði, staðfestir Leila Solmunde, formaður í mbf.

Hon sigur, at útreiðslurnar hjá felagnum eru tvey starvsfólk, umframt kostnaðin at hava skrivstovuna virkna. Restin av peninginum verður býttur ímillum tey 23 feløgini.

### Eingin virðing

– Tú kanst ætla, at tað er stórur munur á at hava 300.000 kr at býta í mun til 450.000. Hetta ger, at feløgini nú mugu út hvør í sínum lagi at skaffa sær peng á annan hátt. Tað fer at darva kunningararbeiðnum, greiðir Leila Solmunde frá.

Hon leggur afturat, at alt arbeiðið, sum feløgini gera hvør sær, er sjálvboðið og tí ólønt.

– Hesi fólkini spara landinum nógvar pengar, tí um tey ikki vóru, hevði alt teirra stóra arbeiði verðið lagt á heilsuverkið. Tað hevði verið ein stór útreiðsla fyri landið, staðfestir Leila, og undrast á, hví arbeiðið, hesi fólkini gera, verður so lítið virt.

Hon sigur, at einasti máti at fáa pening til vega, er við lutaseðlum og bingo. Tey 23 feløgini mugu sostatt út at kappst um peningin, ið er at fáa, heldur enn at samstarva, staðfestir Leila.

### Mótmæla

Leila Solmunde sigur, at tað er ógvuliga hugstoytt, at skula skerja so nógv av játtanini.

– Teir hava valdið, og vit hava ongar aðrar møguleikar enn at royna at mótmæla, antin við einum brævið ella við eini telefonsamrøðu. Eitt mótmæli fer í øllum førum at koma frá okkum, men hvat hjálpir tað, spyr Leila.

Hon sigur, at hon er greið um, at øll feløg skulu spara, og at eisini tað almenna skal skerjast 10%. Hon skilir tó ikki hví so stór orka verður løgd í smáu feløgini.

– Peningurin, ið verður tikin frá okkum og hinum smáu feløgunum, snýr seg jú um marginal tøl á fíggjarlógini. Tey síggjast nærum ikki aftur, men tey gera allan munin hjá okkum. Tað vita teir, ið gera fíggjarlógina eisini væl. Tí kennist tað veruliga sum, at vit og okkara stóra arbeiði ikki verða tikin í álvara, staðfestir Leila Solmunde.

– Vit fara at mótmæla. Men eg eri stórliga bangin fyri, at mótmælini fara at verða sum at blása út í tóman heim. Tað fer nokk ikki at gera nakran mun, tíverri, sigur Leila Solmunde at enda.

Sinnisbati:

## Tola ikki at missa nakað



– Vit tola avgjørt ikki at missa nakað. At verða sálarliga sjúkur er eitt stórt tabu evni í Føroyum, og tí er kunnandi arbeiðið, vit gera, av alstórum týdningi. Men nú verður tað skert, sigur formaðurin í Sinnisbata, Soffi Egholm.

Sinnisbati hevur havt eina játtan áljóðandi 200.000 kr árliga. Eisini tey hava nú fingið boð um at skerja 10 %.

– Sjálvsagt kemur hetta at merkjast, tí vit hava so óalmindiliga lítið av pengum frammanundan. Vit hava ikki endaliga fastlagt hvar skal sparast, men hetta kemur í øllum førum at ganga útyvir okkara virkni, staðfestir Soffi Egholm.

Hon sigur, at Sinnisbati er í eini menningartíð í løtuni, og at hendan stóra skerjingin tí kemur ógvuliga dátt við.

– Tey sálarliga sjúku í Føroyum hava leingi ligið á síðulinjuni, uttan at verið hoyrd. Gongd er endiliga komin á, og psykiatrilógin verður nú endurskoðað og dagførd, so hon verður tíðarhóskandi. Í hesum sambandi hava vit eitt stórt kunningararbeiði, sum má gerast. Tað arbeiðið verður nú skert, sigur Soffi.

Hon sigur, at tey í Sinnisbata ætla at ferðast kring landið, og seta á stovn lokalfeløg, sum kunnu stuðla høvuðsfelagnum í Havn.

### Satsa uppá sjálvboðið

Soffi sigur, at tey nú, í enn størri mun enn fyrr, mugu satsa uppá sjálvbodna arbeiðið og peningaliga stuðulin, sum privatfólk og feløg lata.

– Vit liva av, at fólk nýta sína tíð og orku uppá okkara arbeiðið. Tað er spell at skula koyra enn meiri á tey, men tað verða vit noydd til, staðfestir hon.

Hon sigur, at tey hava fingið kunnandi tilfar úr Danmark, faldarar og tílíkt, sum tey skuldu umseta til føroyskt. Men nú verða ikki ráð til tað. Húsaleiguna fáa tey ikki gjørt nakað við, og limagjaldið verður ikki hækkað.

Hon sigur at Sinnisbati heilt víst fer at gera vart við seg, men hon væntar ikki, at tað fer at gera nakran mun.

– Avgerðin er jú tikin, so eg vænti at tað verður ringt at fáa nakað

Ígjøgnum. Men vit fara at royna, sigur hon at enda.

Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri:

## Harmiligt

– Øll hava tikið sín part av hesum sparingunum. Sjálvsagt er tað harmiligt at skula skerja smáu feløgini eisini, men fíggjarligi veruleikin loyvir ongum øðrum, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri

– Skulu vit fáa skil á fíggjarlógina, er alneyðugt, at øll taka sín part av sparingunum. Men sjálvsagt er tað sera harmiligt, staðfestir Bárður Nielsen.

Hann sigur seg ikki vilja fara í smálutir við, hví landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum júst hevur valt hesi feløgini burturúr, til at spara 10%.

– Tað er altíð harmiligt at gera inntriv á hendan hátt, men tað er nú einaferð ein neyðug uppgáva, sum vit mugu gera, sigur hann.

### Ikki vantandi virðing

Spurdur um landstýrismenninir ikki hava virðing fyri øllum tí stóra arbeiðnum, hesi feløgini gera, og um teir ikki eru greiðir um, at landið sparir nógv uppá sjálvbodna arbeiði teirra, svarar Bárður ógvuliga avgjørdur.

– Tað er absolut ikki vantandi virðing, ið hevur ført til hesar sparingarnar. Eg havi sjálvur verið nógv við í sjálvbodnum arbeiði. Tað er nakað, tú brúkar nógva tíð og orku uppá, og eg havi fult forstáilsi fyri, at fólk eru skuffað, nú játtaninar eru skerdar, sigur hann, og leggur afturat, at veruleikin tíverri er hann, at færri pengar eru til.

Hann heldur fram og sigur, at hesi feløgini eru vælkomin at gera vart við sína ónøgd.

– Tað verður so viðgjørt her í tinginum, og síðani í fíggjarnevndini. Eg kann ikki garantera fyri, at tað hjálpir, men tað er so altíð betur at gera vart við seg enn einki at siga, staðfestir Bárður Nielsen at enda.